# Trapputingið mennir samfelagskjakið

**Fyrsta trapputingið í Miðlahúsinum í almennu fundarrøðini, sum Tinghelluredaktiónin skipar fyri, var mánakvøldið. Evnið var mentan og gransking, har serfrøðingar og løgtingsmenn høvdu upplegg til kjak**

TRAPPUTING
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Trapputingið í Miðlahúsinum í Vágsbotni um gransking og mentan var sera væleydnað. Hóast tingmennirnir báðir, John Johannesen og Finnur Helmsdal eina løtu fóru í sjálvsving við ábreiðslum og reypi um, hvør hevði gjørt hvat og nær og hví, so var kjakið annars livandi og áhugavert. Serfrøðingarnir, Jenny Petersen frá Tjóðpalli Føroya og Rúna Hilduberg úr Granskingarráðnum, hildu góð upplegg, og áhoyrarnir luttóku aktivt í kjakinum.

Sjálvt teir báðir tingmennirnir tyktust at lurta eftir onkrum øðrum enn sær sjálvum, og tá teir høvdu stangast eina løtu, tyktust eisini teir áhugaðir í einum veruligum mennandi kjaki, har andstøða og samgonga ikki vóru høvuðsevnið.

Áhoyrarnir umboðaðu bæði mentunarpallin, granskingina og vinnulívið, og hetta merkti kvøldið og kjakið.

Við Trapputinginum hevur Miðlahúsið í Vágsbotni givið samfelagskjakinum eitt annað bein at standa á, og tað tykist, sum um fólk hava tikið hetta til sín og møta trúfast til tiltøkini.

Í leygardagsblaðnum verður longri frásøgn um tiltakið og framløgurnar hjá luttakarunum verða prentaðar.

Næsta Trapputing verður mánadagin í komandi viku, og evnið verður almanna- og heilsupolitikkur.



*Tær báðar Jenny Petersen og Rúna Hilduberg høvdu hvør sína »løgmansrøðu«. Politisku innleggini høvdu Finnur Helmsdal úr Tjóðveldisflokkinum og John Johannessen úr Javnaðarflokkinum. Orðstýrari var Kári á Rógvi*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

